Íslandsvegur 10, FO-100 Tórshavn
Tlf. 211428 – adhd@adhd.fo - www.adhd.fo

**Viðmerkingar um lógaruppskot**

*Tórshavn, hin 24.oktober 2023*

Viðmerkingar frá ADHD felagnum um uppskotið hjá samgonguni at minka um tilskotið til heilivág og hækka egingjaldið, ein broyting, ið ger tað serstakliga nógv verri fyri fólk við ADHD og familjur, ið eru raktar av ADHD.

ADHD felagið loyvir sær at gera viðmerkingar til málið, tí hesar broytingar kunnu raka okkara limir sera meint. Vit í nevndini í ADHD felagnum arbeiða sjálvboðið og ólønt og hava tí ikki stundir til at nærlesa uppskotið, men hava hesar viðmerkingar.

ADHD felagið mótmælir staðiliga, at trivnaðarnevndin góðtekur lógaruppskotið

> *LM-025/2023 - Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almenna heilsutrygd (Heilsutrygdarlógin), sum ber við sær, at heilvágur gerst dýrari fyri fólk ið bera brek.*

Áleið 70-80% av fólkum við ADHD fáa munandi gagn av ADHD heilivági. Heilivágurin ger, at ung megna skúlan, at vaksin megna sítt arbeiði, og at foreldur við ADHD megna gerandisdagin við børnum og halda hús og heim.

Hagtøl í Danmark vísa, at av 25 ára gomlum hava bert 33% við ADHD eina miðnámsútbúgving, hetta í mun til 80% av samlaða fólkatalinum. Færri enn 10% hava eina longri útbúgving ímun til 1/3 av restina av fólkunum. Yvir 30% av vaksnum menniskjum við ADHD eru í láglønarbólkum, til samanberingar við 7% av øllum.

Tí kom tað púra óvart á okkum í ADHD felagnum, at omanfyri nevnda lógaruppskot varð lagt fram, uttan at verða sent til hoyringar hjá viðkomandi pørtum.

Vit vilja heldur hava, at ung og serliga lesandi fáa heilivágin ókeypis, tí helivágurin ger, at tey yvirhøvur megna sskúlan. At hava ADHD ger, at tey longu mugu brúka alla sína orku uppá skúlan og hava ikki orku til eisini at arbeiða fyri at hava ráð til heilivág.

Vit í ADHD felagnum eru bangin fyri, at um heilivágurin kostar ov nógv, er einasti mátin, ið ung hava at fíggja heilivágin, at selja ein part av heilivágnum til gramma marknaðin.

Tó vita vit, at foreldur í flestu førum royna at rinda heilivágin fyri tey ungu, helst ímeðan tey ganga í skúla. Vit eru stórliga bangin fyri, at hægri gjald fer at økja um fátækaragjónna, tí sperd foreldur fara at hava verri ráð at fíggja heilivágin hjá børnunum, og uttan heilivág fáa tey ikki útbúgving.

Sostatt er hettar við til at fastlæsa ein bólk við breki sosialt, sum hagtøl annar vísa klárar seg líka væl sum onnur, tá tey fáa viðgerð.

Vit vita, at ADHD er 80% arvaligt, tað vil siga, at nógvar familjur eru, har annað foreldrið og eitt ella fleiri børn hava ADHD. Hjá hesum familjum fer hækkingin at máa teppið heilt undan.

ADHD felagið mælir til, at heilivágur átti at verið latin lesandi ókeypis, nevnliga fyri at hjálpa ungum ígjøgnum miðnám og hægri lesnað, fyri at tryggja at fólk við ADHD kunnu gerast sjálvbjargnir borgarar. Í síðsta enda verður tað sera kostnaðarmikið fyri samfelagið, um ung ikki hava ráð til sín heilivág.

Fyri okkum í ADHD felagnum er tað púra óskiljandi at eitt slíkt uppskot kann verða lagt fyri Føroya Løgting heilt uttan fyrst at hoyra tey, ið verða rakt.

Vit heita tí inniliga á Føroya Løgting um at afturvísa lógaruppskotinum ella á allar løgtingslimir um *ikki* at samtykkja lógaruppskot LM-025/2023.

Virðingarmest,

Nevndin í ADHD felagnum

Bjørg Dam
Poula Patursson
Maiken á Mýrini
Pætur Nattestad Petersen
Petra Weihe Mikkelsen
Laura Kathrine Apol
Edmund Djurhuus
Eyð-Britt Tjaldrastein
Louisa Fjallsbak
Berit Unn Petersen